# TILTØK

**Frelsunarherurin, Tórsgøta**
Sunnudagin kl. 11 Møti, Palle Petersen talar. Eingin sunnudagsskúli, men familjusamling kl. 17 har øll eru vælkomin. Drekkamunnur.
Mánadagin kl. 17 Smáskótamøti og kl. 19 Stórir skótar.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evnið: Ein trúgv sál og ein hóttandi krossur. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Leygarkvøldið verður einki Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 er evnið: »Náði Guds í lívi Jobs« og á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 er evnið: »Job« á báðum møtunum talar Klæmint Eliasen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.livdin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti við Egil Joensen.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20 After Eight.
Leygarkvøldið Eyka Action!!! Kl. 21 Evnið: Bøn fyri býnum, kl. 22 Verður farið í býin at biðja.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Anniku við Skipá.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikudagin kl. 7 Bønarmøti.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Marcelin Radiu, prestur í Mariukirkjuni. Kl. 14 Sunnudagsskúli.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til 18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Verið her og vakið við mær, vakið og biðið«.

**Meinigheitshúsið**
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Leygardagin kl. 16-18.30 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Høgna Poulsen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Alex O'Campo, evnið: Relatiónir.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, evnið: Rættvísgjørd í Kristusi 2. partur, talari: Sam Jakobsen, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Familjumøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti har Justinus Eliasen úr Leirvík talar.
Sunnukvøldið kl. 21 Bønar- og lovsongsløta fyri ung í aldrinum 13-19 ár.
Mánakvøldið kl. 19 verður Ungdómstiltak, sum er ætlað ungdómi (5.-10. flokk).
www.hebron.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20-22 verður JC-Teens.
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt.
Sunnudagin kl. 11 Møti og Sunnudagsskúli.
www.rhema.fo

**Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin 29. feb. Møti v/ Reimund Langgaard.

**Nólsoyar Missiónshús**
Missiónsvikan er flutt til 24.-28. mars.

**Saron í Vestmanna**
Í morgin Bíbliuseminar við Jón Miðberg kl. 15, evnið: Samkoman. Verið hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 18 Samkomufundur.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Skráin fyri missiónsvikuna 2004 á Glyvrum:
Fríggjadagin kl. 19.15 Bøn og lovsangur, kl. 20 Reimund Langgaard talar, Jákup Justinussen og Mariann Askham syngja.
Leygardagin kl. 9.30 Morgunmatur, kl. 10 Bíbliutími v/ Jógvan Fríðrikssyni, evnið: Profetiini tala«. kl. 16 Bønarmøti, kl. 19.15 Bøn og lovsangur, kl. 20 Gunnar Reynslág talar. Ungdómskórið í Vágum syngur.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/altarg., v/ Meinhard Bjartalið, presti, kl. 14.30 Familjumøti v/ Sigrun Mikkelsen, Sangkreftir úr Sørvági, kl. 18.15 Bøn og lovsangur, kl. 19 Torleif Johannesen talar, Glyvra streingjakór syngur. Innsavnan. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.jesus.fo

**Missiónsvikan í Bø**
Missiónsvikan í Bø byrjar í kirkjuni hósdagin kl. 20 har Oddmar á Steig talar og manskórið í Vágum syngur.
Fríggjadagin talar Jóan Petur Johannesen og Ungdómskórið syngur, drekkamunnur verður aftaná møti.
Leygardagin talar Jógvan Steintún og Magni Christiansen syngur.
Sunnudagin Gudstænasta við altargangi, David Johannesen prædikar. Familjumøti kl. 15 Jan og Nancy luttekur. Barnakórið í Bø syngur, kl. 18 Møti har Ingolf Johannesen talar og Streingjakórið syngur og vitnar.

**Bygdalegan fyri Skála**
verður í Leguhúsinum í Nesvík frá 19.-21. mars.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj, kl. 11 Barnamøti, kl. 19 Sang og Evangel. møti við Theodor Petersen og døtrum.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Nerija á Skála**
Á møtinum fríggjakvøldið kl. 20 tala John í Skemmuni, Lars Djurhuus og Finnbjørn Nielsen. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 17.30 Tim. 5.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor og kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnukvøldið kl. 18 verður frágreiðing um arbeiði í missiónshúsinum. Ungdómsmøti sunnukvøldið kl. 21 heimligar kreftir luttaka.

**Betesda í Norðoyggjum**
Fríggjakvøldið kl. 20: Kristnastovuvinir hittast til »fríggjakvøldssamkomu« í kjallaranum í Betesda. Øssur og Susan vera við.
Sunnukvøldið kl. 18 talar Øssur Berghamar.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Páskastevna verður í Skálanum frá skírishósdegi.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Silverius Jacobsen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Skúlin í Hvannasundi**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Leivur í Búð. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, Samal Hanni tosar, kl. 18 Hugnaløta, filmur verður vístur.
Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið í Skopun**
Missiónsvikan heldur fram kl. 20 Møti v/ Kajberg Davidsen og Sigfred Johannesen, Jónhilda og Gulak Hansen syngja.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ Árna Kjærbæk, Vági, Jónhilda og Gulak Hansen syngja. Innsavnan.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta v/ altarg., Jákup R. Hansen, prestur prædikar, kl. 15 Familjumøti, Krist-Bjørg og Molly syngja, kl. 18 Møti v/ Thomas Juul Askham, Jónhilda og Gulak syngja. Innsavnan. Bønarløta er hvørt kvøld 1/2 tíma áðrenn møtini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Fríggjakvøldið kl. 20 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari og Knút Larsen úr Fuglafirði. Kórið úr Porkeri syngur.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eyðun Christiansen talar.
Týsdagin kl. 20 Heimaforbundið.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Missiónshúsið í Sumba**
Um Gud vil verður missiónsvikan í døgunum frá 2.-7. mars.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 23. februar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Føðingardagur og ársfundur verður 12. mars. Val verður av tveimum nevndarlimum. Øll uppskot eru vælkomin í postkassan í Tilhaldinum.
***Týsdagur 24. februar***
kl. 10-11.30 Sangur, F. og B. Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14 »Ábyrgd fyri egnari heilsu« Heilsugóður kostur, Jóhanna á Tjaldrafløtti. Framsýning verður á Ólavsøku av barnamyndum frá 30'- og 40'unum og brúðarmyndum frá 30'-60'unum. **Allar myndir eru vælkomnar.**
***Mikudagur 25. februar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilmeld. tlf. 316491
kl. 15 Túrur
**kl. 17-21 Opið hús**
***Hósdagur 26. februar***
kl. 10-110.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
***Fríggjadagur 27. februar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. tilmelding mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 29. februar verður gongutúrur av Oyggjarvegnum til Leynar eftir bygdargøtuni. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Lættur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 23. februar***
Tunnusláttur.
Drekkamuður v/ føstulávintsbollum. Vit fara upp á gólv.
***Týsdagin 24. februar***
Drekkamuður
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 25. februar***
Maria og Morid siga frá hvussu tað er at vera næmingur á Húsarhaldsskúla Føroya. Tær vísa fram handaligt arbeiði, og gera ein góðan drekkamunn
***Hósdagin 26. februar***
Drekkamuður
Prát og sangur
***Fríggjadagin 27. februar***
Opið hús
Drekkamuður

*Andakt er hvønn dag – bløðini eru altíð til taks í Fløvanum*

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

## 80 ÁR

Í dag 27. februar fyllur Torkil Beder prestur, Fuglafjørður, 80 ár. Dagurin verður hildan saman við familjuni.



# FILMSTEIGURIN

## Timeline

Tá fornfrøðingarnir megna at koma framat kjallaranum undir klosturleivdini finna tey ein fullkomuliga óvæntaðan dýrgrip. Á einum gomlum pergamenti finna teir eitt neyðarróp, sum er dagfest í 1357. Skrivað hevur Johnston professari, sum eisini er leiðarin undir verandi útgevstrinum!

Fáur dagar undan hesum er professarin horvin hjá trygdarfelagsskapinum, ITC, sum rindar fyri útgrevsturin, og tá sonur Johnston, Chris, saman við tveimum fornfrøðingum, Kate og Andre, krevur at fáa svar, verða teir vístir inn til eitt eitt tól – eina tíðarmaskinu. Trupulleikin er, at professarin er farin aftur í tíðina til tíðarskeiðið, har fraklendingar og bretar stríðast um La Roque borgina. Og enn er hann ikki afturkomin.

Tey trý gera nú av at royna at bjarga professaranum. Úr mest fram-





komnu tøknini í 21. øld koma tey brádliga aftur til eina tíð, har riddarar úr ymsum legum stríðast, og alla tíðina mugu tey liva við vandanum um, at likamið kann gerast eitt høvur styttri.

Samstundis sum tey soleiðis skulu royna at bjarga professaranum, mugu tey eisini ansa eftir, at tey ikki broyta gongdina í heimssøguni, og hetta í sjálvum sær kann eisini gerast ein stórur trupulleiki.





**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 27.02. | kl. 20$^{30}$ | Fríggjadagin | 27.02. | kl. 23$^{00}$ |
| Leygardagin | 28.02. | kl. 20$^{30}$ | Leygardagin | 28.02. | kl. 23$^{00}$ |
| Sunnudagin | 29.02. | kl. 19$^{30}$ | Sunnudagin | 29.02. | kl. 22$^{00}$ |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 27.02. kl. 20$^{00}$ Leygardagin 28.02. kl. 20$^{00}$
Sunnudagin 29.02. kl. 20$^{00}$




Fríggjadagin 27.02. kl. 22$^{30}$ Leygardagin 28.02. kl. 22$^{30}$
Sunnudagin 29.02. kl. 22$^{15}$




**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 27.02. kl. 17$^{30}$ Leygardagin 28.02. kl. 17$^{30}$
Sunnudagin 29.02. kl. 17$^{30}$




**Billettprísur: 65,- kr.**
Fríggjadagin 27.02. kl. 18$^{00}$ Leygardagin 28.02. kl. 18$^{00}$
Sunnudagin 29.02. kl. 18$^{00}$

P **BIO KIOSKIN** P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.